## Gamal rennari

Tað var einki aldursmark og heldur einki krav um tíð ella førleika, tá íslendska ítróttarsambandið skipaði fyri teirri árligu rennikappingini fyri kvinnur seinasta leygardag. Tað kom Torfhildur Torfadóttir væl við, so hon gjørdi av at taka lut í renningini, hóast hon er 104 ára gomul. Tað er helst óneyðugt at siga frá, at Torfhildur var tann elsta av teimum 15.000 kvinnunum, sum runnu. Hon er fødd tann 24. mai í 1904, skrivar Vísir.



## Íslendingar eisini sild

Føroysku nótaskipini hava fingið væl av sild norðuri við markið við Jan Mayen í seinastuni, og nú eru íslendsk skip eisini farin at royna har. Morgunblaðið skrivar, at skipið Sigurður var í Þórshöfn í gjár við umleið 1.500 tonsum av sild, sum teir fingu í sjey køstum. Blaðið veit eisini at siga, at sjey onnur íslendsk skip eru á sildaleiðini, og at umborð á teimum størstu skipunum verður sildin skorin og fryst. Hini skipini landa í Íslandi.

## Motorurin á Másin steðgaði

Farvatnið sum svínoyingar og fugloyingar ferðast í er ikki altíð eins tespiligt allar ársins tíðir.

Talan er lutvíst um opið hav, og her hava veður og streymur sín avgjørda leiklut í, hvussu ein túrur við Másanum er ella kann verða.

Hinvegin hava tey á Másanum eisini verið úti fyri, at motorurin umborð steðgaði einaferð hann legði leiðina millum eystastu oyggjar okkara.

Hóast hesar umstøðurnar var eingin panikkur umborð og tað hendi tíbetur eingin skaði. Men hetta var kortini ein ávaring um, hvat kann henda ein ringan vetrardag í Svínoyarfirði við einum skipi, ið varð smíðað í 1959.

Manningin umborð dugdi væl at handfara støðuna, men sum Eyðun Jacobsen heldur speiskliga tekur til:

- Tá motorarnir umborð á Smyrli herfyri steðgaði í 5 sekund, hoyrdu vit um tað teir næstu 14 dagarnar.

- Men einki var sagt og skrivað ta ferðina, tá motorurin á Másanum steðgaði á opnum havi!



- Vit vita ikki, hvat ein slíkur eykatúrur hevði kostað Strandferðsluni, sigur borgarstjórin í Svínoy, Eyðun Jacobsen, sum sæst uttast høgrumegin

# Daniella setti spakan í

**Nú er klárt at fara undir bygging av nýggja bókasavninum á Sandi**

MENTAN
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*Daniella Olsen við hakanum, saman við fegnum borgarstjóra Páll á Reynatúgvu. – Vit eru heppin at eiga slíkar lýsandi vitar sum Daniellu, segði borgarstjórin í takkarrøðu síni*

*Mynd: bkv.fo*

**Sandur**: Seinnapartin í gjár var hátíðarløta á Mørkini Miklu.

Klokkan 17 setti Daniella Olsen hakan í fyri nýggja bókasavninum, ið skal byggjast við umsitingarbygningin hjá Sands Kommunu.

Ein rúgva av fólki var samankomin til hátíðarløtuna. Eftir løtuna uttanfyri varð boðið inn til smyribreyð og annað gott.

Í takkarrøðu síni bar borgarstjórin á Sandi, Páll á Reynatúgvu uppá mál, at tíðarandin í dag ber brá av sjálvsøkni.

Við slíkum hugburði verður arbeitt fram ímóti at hjúkla um sítt egna, og hinvegin at krevja nóg mikið fyri tað íkast, ein letur samhaldsfasta samfelagnum gjøgnum skattaskipanina.

- Men sum lýsandi vitar, og ímóti harða rákinum, standa úrmælingar, kvinnur og menn, sum sjálvboðin leggja tey eyka klípir í varðan, sum ríka okkum øðrum gerandisdagin. Tey finnast framvegis í føroyska samfelagnum, og Daniella Olsen er ein av hesum úrmælingum, vísti borgarstjórin á.

Hann legði dent á, at við hesi framúr gávuni til Sands kommunu, uppá ikki minni enn tvær milliónir krónur, umframt hennara egna savn av bókum, er grundarlag lagt fyri at raðfesta eitt øki, sum ongantíð í Sandoyar søgu hevur fingið ta rúmd, sum bókfólkið í oynni hevur uppiborið.

Arbeitt hevur verið við hesi ætlanini síðani í januar 2001, og nú er ætlanin at tað skal verða liðugt beint undan jólum í ár.

Bókasavnið verður bygt og samanbundið umsitingarbygninginum hjá kommununi. Bygningurin verður í tveimum hæddum, og er uppá umleið 360 fermetrar.

# 0 klovn í Klaksvík

**Ein stór, spennandi og øðrvísi framsýning við klovninum 0 verður í Badmintonhøllini í Klaksvík 24. juni. Hetta hendir í samband við at Klaksvíkar kommuna fyllir 100 ár**

UNDIRHALD
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*Klovnurin 0 dugir meiri enn tey flestu*

**Klaksvík**: - Hetta er ein rúkandi framførsla fyri øll ættarlið, skapt av einum klovni við gudagávum og teimum lutunum, sum vanliga hoyra til eitt væl dekkað døgurðabord, verður sagt um hesa framførsluna.

Við sínum soloavriki bergtekur O áskoðaran við tónlistarligari "timing", framúrskarandi yvirraskilsum og eitt fantasilandslag av Dr. Strangelove-máti og einum fangandi krígsspæli.

Tá klovnurin 0 – alias Joël Colas – fyrst sníkir seg inn á manesjuna er hann ein smæðin og einsamallur drongur. Hann finnur fram vin sín – eina hálvtóma vatnflösku – og setir seg eyðmjúkur á eitt borð.

Síðani tekur hann fram ítróttartaskuna, fylta við knívum, gaflum og alskyns bestikki. Hesi brúkar hann til at byggja upp rútmur og skeiv brot av løgum, í tí hann "samplar" ymisk hvøll ljóð.

Knappliga er áskoðarin mitt í einari frásøgn, har O við megini hjá einum Peter Sellers er broyttur til ein einarræðisharra, sum bóltar fram á sínari krígsmaskinu.

Heilt opin frammanfyri áskoðarunum verður hin smædni drongurin ein krígsmaskina gjøgnum broytingartalentið hjá hesum einastandandi klovni. Tónleikurin koyrir, hann jonglerar við fløskum, maskinuriflur skerja gjøgnum luftina, til áskoðarin situr í skellilátri, í hugtakanini og eitt lítið sindur bangin.

Allar skúlasýningarnar verða kl. 10 henda dagin og vara 45 minuttir. Um kvøldið verður almenn sýning.